# Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

**Spyrjari:** Eyðgunn Samuelsen, løgtingsmaður

**Svarari:** Sólvit E. Nolsø, landsstýrismaður í almannamálum

**Evni:** Vantandi tilboð til børn við serligum tørvi

**Spurningar:**

1. Heldur landsstýrismaðurin, at tað er nøktandi, at fosturforeldur ikki vita sunnukvøld, um barn teirra framhaldandi hevur eitt tilboð mánamorgun?
2. Hvat verður gjørt fyri at tryggja, at tílikt ikki hendir aftur?
3. Ætlar landsstýrismaðurin at taka stig til at eftirhyggja og betra um samstarvið millum barnaverndina og Almannaverkið?

**Viðmerkingar:**
So hendi tað aftur, at vit hoyrdu dømi í miðlunum um eitt barn við serligum tørvi, ið er dottið niður ímillum skipanir. Hesaferð snýr tað seg um eitt barn, ið er til fosturs, og er tað samstarvið millum barnavernd og Almannaverkið, ið ikki riggar, sum tað skal.

Tað er als ikki nøktandi, at foreldur ikki vita eitt sunnukvøld, um barn teirra hevur eitt tilboð dagin eftir. Hetta er eisini sera órógvandi fyri barnið, tí børn hava tørv á skipaðum viðurskiftum, og ofta tola tey ikki broytingar.

Hetta er enn eitt dømi um ein víðfevndan trupulleika við vantandi samstarvi millum geirar. Tað sýnist ikki sum, at trupulleikin verður tikin í nóg stórum álvara. Fyri at fáa greiðu á, um hetta er nakað, ið landsstýrismaðurin ætlar at broyta, verða hesir spurningar settir.

**Á Løgtingi, 30. mai 2022**

Eyðgunn Samuelsen